FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# LÝSING EFTIR DAGRØKTARUM

Søkt verður eftir dagrøktarum til kommunalu dagrøktina í Fuglafjarðar kommunu at byrja tann 01. mars 2008 ella skjótast tilber.

Ein treyt fyri at søkja starvið er, at dagrøktarheimið skal verða barnavinarligt innrættað, har rúm er til børnini at spæla, og at eitt hóskandi trygt spæliøki er uttanfyri.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya fyri dagrøktarar.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at ringja til Eyðgerð A. Petersen, dagrøktarleiðara á telefon 73 77 94, ella sosialdeildarleiðaran á telefon 73 77 56.

Møguligar umsókinir, ið skulu verða skrivligar, skulu verða Fuglafjarðar kommunu, Postboks 30, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi leygardagin tann 16. februar 2008.

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

VESTMANNA KOMMUNA

# REINGERÐARFÓLK

Hervið verður søkt eftir einum fólki at gera reint nakrar tímar um vikuna.

Reingerðast skal í vanligari arbeiðstíð í hølunum hjá frítíðarstovuni, í ungdómshúsinum Staðið og á havnarskrivstovuni.

**Fyribils er talan um**
- 5 tímar um vikuna í Frítíðarstovuni (kann økjast til 7 tímar)
- 2 tímar um vikuna í Ungdómshúsinum Staðið (4 tímar eftir at tiltøk hava verið)
- 2 tímar um vikuna á Havnarskrivstovuni

Viðkomandi, sum settur verður, skal kunna átaka sær aðrar reingerð hjá kommununi.

Starvið verður lønt eftir sáttmála ímillum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Arbeiðarafelag.

Skrivlig umsókn skal verða Vestmanna Kommunu, postboks 91, 350 Vestmanna, í hendi í seinasta lagi 18. februar 2008, kl. 1200.

**Vestmanna Kommuna**



# Hús í Klaksvík til sølu

Ognin Skáltavegur 25 til sølu, um hóskandi boð fæst.

**Matr. nr.** 1103
**Grundøki:** 417 m²
**Húsini:** ca. 140 m² í tveimum hæddum við íbúð í kjallarahædd við egnari inngongd.

Hetta eru timburhús frá 1967, við góðum útsýni, bygd á betonggrund og hava aluminiumstak. Húsini eru í góðum standi, bilhús er á økinum og garður um økið

**Ábyrgd tlf. nr. 457791/222252**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Nólsoyar skúli

**Søkt verður eftir fólki til Nólsoyar skúla at byrja 15. februar til:**

7 stuðulstímar um vikuna
2 t/v í handaverk og list
leysar vikartímar

Áhugað fáa nærri at vita við at venda sær til skúlaleiðaran
Tlf. 282465 ella 302465

**Umsóknir skulu verað skúlanum í hendi í seinasta lagi 10. februar**

**Gunnvør Joensen, skúlaleiðari**
**Nólsoyar skúli**
**FO-270 Nólsoy**

# Hús til sølu

## ella umbýting við íbúð

Stór 1. planshús, ný renoveraði við íbúð, í friðarligum umhvørvi.

**Bill. mrk. 230108-001**

FISKIRANNSÓKNARSTOVAN
FAROESE FISHERIES LABORATORY
Nóatún · Boks 3051 · FO-110 Tórshavn

# Laborantur ella hjálparfólk til Fiskirannsóknarstovuna

Fyri starvsfólk í farloyvi verður søkt eftir einum fólki til Fiskirannsóknarstovuna frá 1. mars 2008 og árið út. Arbeiðið umfatar m.a. kanningar av plantu- og djóraplankton, kemiskar kanningar og arbeiði við úrslitum. Laborantur ella umsøkjari við samsvarandi førleika hevur fyrimun.

Lønin er sambart sáttmála við avvarandi felag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Eilif Gaard, tlf. 353911.

Umsóknir skulu vera Fiskirannsóknarstovuni í hendi í seinasta lagi 14. februar 2008.

Lær at skriva
**føroyskt!**
**www.kennarin.dk**



# Stríðist tú við vektina?

Ring til mín, eg havi eitt sunt og effektivt "hjálpimiddel".

**Jana 51 71 00 / 31 71 00**
**lr@kallnet.fo**
**www.lr.fo**

# Umboðsmannaval

Sambært grein 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til val 1. mars 2008.

Veljast skulu umboð fyri fylgjandi umdømir: Rituvík, Æðuvík og Nes.

Uppskot til umboð skulu skrivliga vera sjúkrakassanum í hendi í seinasta lagi 16. febr. 2008.

NES SÓKNAR SJÚKRAKASSI 24. FEBRUAR 1914

**NES SÓKNAR SJÚKRAKASSI**
FO-620 Runavík